# Ársfrágreiðing
# 2024



SJÚKRAHÚSVERKIÐ

**Útgevari** Sjúkrahúsverkið
**Myndir** Starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum og Gwenaël Akira Helmsdal Carré
**Uppseting** AnniJanni
**Prent** Estra

# Fororð

Árið 2024 byrjaði við stórari broyting í leiðsluni fyri Sjúkrahúsverkið, tá Hanus Toftheyggj varð settur í starv sum stjóri í Sjúkrahúsverkinum og á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Við hesum var leiðslan aftur fult mannað við trimum stjórum og fýra varastjórum.

Sum heilsuvísindin flytir seg er týdningarmikið, at vit flyta okkum við. Tí var gleðiligt, at øll trý sjúkrahúsini høvdu stór frambrot í virkseminum. Á Landssjúkrahúsinum fingu vit nýggjan CT skannara, á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fingu vit nýggjan 3T MR skannara, og nýggj dialysudeild varð sett á stovn á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Heilsugranskingin hevði eisini frambrot í 2024, tá Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetur Føroya skrivaðu undir avtalu um universitetssjúkrahús, umframt at biobankin flutti heim til Føroyar í juli.

Sjúkrahúsverkið hevur framt stórar broytingar í fysisku kørmunum seinastu árini, og 2024 var árið, tá verulig ferð kom á flytingina í H-bygningin, tá ikki færri enn tríggjar deildir fluttu inn í bygningin. Harumframt eru gomlu læknahúsini í Klaksvík høvuðsumvæld, og fyrisitingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er flutt inn í søguligu húsini.

Tann 23. februar vóru 100 ár síðani, at Drotning Alexandrines Hospital varð tikið í nýtslu. Hetta var hátíðarhildið við stórfingnari veitslu tann 5. mai fyri starvsfólki í Sjúkrahúsverkinum og politikarum, samstarvsfeløgum o.ø.

Tá vit í 2021 fóru undir arbeiðið við strategisku málunum, vóru vit trý sjúkrahús við ymiskum ætlanum og málum. Okkara felags visión var at gerast "Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan". Jú, enn eru vit trý sjúkrahús, men nú arbeiða vit eisini fyri felags endamálum sum eitt Sjúkrahúsverk. Vit arbeiða áhaldandi fyri, at gagnnýta alt okkara góða og fjølbroytta tilfeingi, heilt frá norðast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi til sunnast á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Sanniliga hava vit eisini framt nógv av tí, sum vit settu okkum fyri. Tilsamans eru nú 21 av 39 málum avrikað ella sett í verk. Við ársenda vera tey flestu málini sett í verk, tó vit vita, at nøkur teirra fara at røkka longur fram í tíð.



Strategisku málini fyri Sjúkrahúsverkið hava tó sítt síðsta ár í 2025. Arbeiðið við nýggjari strategi, sum skal byrja í 2026, er farið í gongd, og spennandi verður, hvat vit serliga fara at leggja dent á næstu árini. Tað vit altíð fara at hava sum felags høvuðsendamál er dygdargóð heilsutænasta, og fer hetta altíð at vera drívmegin hjá okkara starvsfólki.

Um tað er nakað, sum eg haldi serliga hevur eyðkent Sjúkrahúsverkið seinastu árini, so er tað rúkandi menning og broytingar. Vit hava gjørt dimensioneringsætlan, fingið nýggj tól til diagnostiska økið, og førleikament allar leiðarar í Sjúkrahúsverkinum fyri at nevna nøkur, umframt mangt annað, sum tú kann lesa meira um í hesari ársfrágreiðingini.

Til endans vil eg vegna leiðsluna takka øllum starvsfólkum í Sjúkrahúsverkinum. Tað eru tit, ið eru drívmegin og hvønn dag vísa, hvussu stórt virði Sjúkrahúsverkið hevur í samfelagnum.

Góðan lesihug!
Steinar Eirikstoft, forstjóri

# Innihaldsyvirlit


Árið, ið fór ..... 5

Starvsfólk og útbúgving ..... 7

Menning av heilsugransking ..... 8

Framhaldandi strategiarbeiði ..... 9

Byggiarbeiði og flytingar ..... 10

Slóðbrótandi tól til Sjúkrahúsverkið ..... 11

Strategi fram til 2025 ..... 12

Virksemið í Sjúkrahúsverkinum í tølum ..... 14

Fíggjarliga úrslitið: 11,2 mió. kr. í avlopi ..... 15

Politiskar raðfestingar í 2024 ..... 15

Gomlu læknahúsini í Klaksvík ..... 16

Nýggj dialysudeild á Suðuroyar Sjúkrahúsi ..... 17

Virksemi á øllum hæddum í H-bygninginum ..... 18

Stórt átak fyri at stytta bíðilistar í Sjúkrahúsverkinum ..... 19

Landssjúkrahúsið 100 ár ..... 20

Visjón, missión og virðir ..... 22

# Árið, ið fór

Árið 2024 var enn eitt hendingaríkt ár í Sjúkrahúsverkinum. Á einum so stórum arbeiðsplássi sum Sjúkrahúsverkið er, eru tað á hvørjum ári nógv nýggj starvsfólk, sum byrja í starvi.

Eitt av nýggju starvsfólkunum var Hanus Toftheyggj, sum tann 1. januar tók við starvinum sum stjóri í Sjúkrahúsverkinum, og sum sjúkrahússtjóri fyri Suðuroyar Sjúkrahús. Ein av fyrstu stóru uppgávunum hjá Hanusi var at samskipa arbeiðið, tá frystilínuskipið Kambur sakk sunnanfyri Føroyar tann 6. februar. 16 mans vóru við skipinum – 14 teirra vórðu bjargaðir og fluttir á Suðuroyar Sjúkrahús. Ein hending av slíkum slag krevur nógv av Sjúkrahúsverkinum, men eftirmetingin vísti, at samstarvið millum starvsfólk og fakbólkar á Suðuroyar Sjúkrahúsi virkaði til fulnar. Eisini í neyðstøðum er alneyðugt, at Sjúkrahúsverkið í Føroyum arbeiðir saman sum ein eind, og tað varð gjørt henda dagin.

Í 2024 fekk Sjúkrahúsverkið eisini nýggjan sjúkrahúsprest, tá Hanus á Gørðum í mai varð skipaður í embætið sum prestur á Landssjúkrahúsinum og í Varðhaldinum. Sum sjúkrahúsprestur fevna uppgávurnar um alt frá samrøðum við sjúklingar um stórt og smátt, sum fyllir hjá tí einstaka, til gudstænastur á deildunum. Tá vit gerast sjúk, kann tilveran sýnast fløkt, og vónloysi kann raka okkum. Tá kann tað vera gott hjá bæði sjúklinginum og teimum avvarðandi at fáa samrøðu um tankar og kenslur við Hanus. Starvsfólk kunnu eisini biðja um samrøðu, supervisión ella undirvísing frá sjúkrahúsprestinum.

Av øðrum nýggjum starvsfólki kunnu nevnast nýggir serlæknar. Úr serlæknajáttanini fekk Sjúkrahúsverkið játtan til serlækna í dermatologi og serlækna í pínuviðgerð. Tá fleiri serlæknar koma í starv, merkir tað samstundis at fleiri kanningar og viðgerðir kunnu veitast í Føroyum, og verða nú nógv færri dermatologiskar kanningar sendar til Danmarkar at greina, og fleiri sjúklingar sleppa framat pínuviðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Nýggj og betri tól gera tað á sama hátt møguligt at gera fleiri kanningar í Føroyum, sum annars høvdu verið gjørdar uttanlands, eins og nýggj tól kunnu gera meira nágreiniligar kanningar í høgari góðsku.




## Í 2024 fekk Sjúkrahúsverkið bæði ein nýggjan CT-skannara og ein nýggjan MR-skannara.

CT-skannari kom á Landssjúkrahúsið í apríl og MR-skannari kom á Klaksvíkar sjúkrahús í apríl. Nýggi 3T MR skannarin í Klaksvík gjørdi 732 skanningar í 2024. Nýggju tólini eru eitt frambrot fyri Sjúkrahúsverkið og fer at geva øllum, ið hava tørv á skanning, eitt enn betri tilboð. Eitt nú verða allar prostataskanningar av føroyskum sjúklingum nú gjørdar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, sum merkir eina betri tænastu fyri sjúklingarnar.

Stór framstig eru somuleiðis gjørd á patologiska økinum. Seinastu tvey árini hevur patologiska økið á Rannsóknarstovuni á Landssjúkrahúsinum framt stórar broytingar. Arbeiðið hevur fevnt um, at gera tað møguligt at bíleggja patologiroyndir gjøgnum Cosmic, sum ger tað lættari at fylgja við, hvar royndir eru staddar, umframt nær svar væntandi kann fyriliggja. Afturat hesum verða fleiri útgreinandi patologikanningar nú gjørdar í Føroyum, ið ger at klinikarin fær meira neyvt svar enn áður.

Við góðum samstarvi ber eisini til at menna nýggj viðgerðartilboð, og í mars varð dialysutilboð sett í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi. Fleiri partar av Sjúkrahúsverkinum hava arbeitt ótroyttiliga saman, um at finna eina loysn fyri at tryggja, at sjúklingar ikki longur hava fyri neyðini at ferðast um fjørðin fleiri ferðir um vikuna, men fáa góða og trygga dialysuviðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi.



# Starvsfólk og útbúgving

## Tann 23. februar kundi Landssjúkrahúsið feira 100-ára føðingardag.

Tá vóru 100 ár liðin, síðan Dronning Alexandrines Hospital lat upp og tók ímóti fyrstu sjúklingunum. Tá flutt varð inn í 1924 starvaðust 28 fólk á hospitalinum.

Í dag starvast góð 1000 fólk á Landssjúkrahúsinum, og góð 1300 fólk í Sjúkrahúsverkinum, sum fevna um umleið 30 ymiskar fakbólkar. Og eins og Sjúkrahúsverkið er arbeiðspláss fyri hesi starvsfólk, spæla vit eisini ein virknan leiklut í útbúgvingini hjá mongum av starvsfólkunum.

Í 2024 vóru í miðal 60 læknar í útbúgvingarstørvum á Landssjúkrahúsinum. Tað tekur nógv ár at útbúgva seg til lækna, og nógvir læknar velja at taka partar av útbúgvingini í Føroyum, alt frá KBU læknum, sum er fyrsta liðið í læknligu víðariútbúgvingini eftir loknan lestur á universitetinum, til læknar, sum taka partar av síni serlæknaútbúgving her.

Sjúkrahúsverkið hevur í 23 ár útbúgvað allar læknaskrivaranæmingar í landinum. Eitt afturlit vísir, at 2001 var fyrsta árið, har læknaskrivaranæmingar vórðu settir í starv, og tá vóru tær tríggjar í tali. Talið av læknaskrivarum vaks støðugt, og í alt hava 38 læknaskrivarar fingið útbúgving á Landssjúkrahúsinum. Tey seinastu árini hava Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús eisini havt læknaskrivarar undir útbúgving. Læknaskrivaraútbúgvingin hevur verið ein tvey ára yrkisútbúgving, har næmingurin kom runt og lærdi um øll serøkini á sjúkrahúsunum. Teir síðstu læknaskrivaranæmingarnir í Sjúkrahúsverkinum vórðu liðugt útbúnir í august. Hendan útbúgvingin er nú niðurløgd og avloyst av útbúgvingini sum sundhedsadministrativ koordinator.

Sjúkrahúsverkið er eisini ein týdningarmikil partur av útbúgvingini hjá sjúkrarøktarfrøðingum í Føroyum. Allar sjúkrarøktarfrøðilesandi, sum lesa BSc í Sjúkrarøktarfrøði á Fróðskaparsetrinum, eru sum partur av síni útbúgving í praktikk í Sjúkrahúsverkinum í fleiri umførum. Eitt afturvendandi tiltak er eisini, at tá nýútbúnir sjúkrarøktarfrøðingar eru lidnar við ritgerðir sínar, er postarasýning av BSc-ritgerðum í forhøllini á Landssjúkrahúsinum.

Umframt at Sjúkrahúsverkið er ein natúrligur partur av útbúgvingini av heilsustarvsfólki, hava eisini aðrir fakbólkar møguleika fyri at nema sær útbúgving í Sjúkrahúsverkinum.

Harumframt er Sjúkrahúsverkið eisini karmur um serútbúgvingar og eftirútbúgvingar hjá starvsfólki. Í 2024 vóru tað til dømis sjúkrarøktarfrøðingar sum ígjøgnum Sjúkrahúsverkið tóku eftirútbúgving innan anæstesi, psykiatri og intensiva sjúkrarøkt.

Seinasta árið hevur Sjúkrahúsverkið verksett leiðslumenning, har allir leiðrar í Sjúkrahúsverkinum, hava verið ígjøgnum eina útbúgving fyri at menna teirra leiðsluførleikar og geva teimum leiðsluamboð, sum tey kunnu brúka í dagliga leiðsluarbeiðinum. Áleið 110 leiðarar, hava verið ígjøgnum ella eru í gongd við leiðslumenningina.

Á hvørjum ári hava tey trý sjúkrahúsini eisini nógvar næmingar úr fólkaskúlanum, sum koma í starvsvenjing. Næmingarnir sleppa at uppliva, hvussu tað er at arbeiða á einum sjúkrahúsi, og møguliga fáa íblástur til at taka eina útbúgving innan heilsuøkið.









# Menning av heilsugransking

## Avtala um universitetssjúkrahús varð undirskrivað millum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetur Føroya í juni.

Hendan avtalan leggur lunnar undir arbeiðið at menna heilsuvísindaliga gransking og útbúgving í Føroyum. Avtalan skal styrkja um góðsku og vissu, so sjúklingarnir fáa eitt enn betri tilboð um heilsufremjan, fyribyrging, diagnostikk, viðgerð, røkt og endurvenjing í Sjúkrahúsverkinum. At gerast universitetssjúkrahús fer at fáa alstóran týdning fyri Sjúkrahúsverkið. Vit fara at fáa meira serføroyska gransking og fleiri serlæknar og onnur serkøn heilsustarvsfólk, sum eisini fer at geva betri sjúkraviðgerðir.

Eitt annað framstig innan gransking var, at biobankin í juli varð fluttur heim til Føroyar. Í biobankanum verða royndir, sum eru tiknar av føroyingum tey seinastu 40 árini, goymdar. Hesar royndirnar eru av stórum týdningi fyri eitt nú ílegugransking í Føroyum. Eisini PKU-kortini, sum frammandundan vórðu goymd í Danmark, komu til Føroya í februar, so tilfarið kann verða savnað og varðveitt her í Føroyum.

Eitt árligt afturvendandi tiltak fyri at varpa ljós á gransking er Granskingardagurin á Landssjúkrahúsinum, sum granskingarnevndin bjóðar til, sum var 22. februar. Á skránni vóru fyrilestrar umframt postaraframsýning og framløgur um ymiskar granskingarverkætlanir.

Fríggjadagin tann 1. november skipaði Heilsugranskingareindin í Sjúkrahúsverkinum fyri tiltaki. Endamálið var at skapa eitt opið forum, har heilsustarvsfólk, granskarar og granskingaráhugað kundu deila vitan, kjakast og menna samstarv innan gransking. Hendan dagin vórðu 11 framløgur hildnar um ymiskar granskingarverkætlanir innan heilsuøkið.






# Framhaldandi strategiarbeiði

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum heldur fram við arbeiðinum við sameining av Sjúkrahúsverkinum, og eru fýra strategisk mál sett í verk í 2024.

Arbeiðið, at fáa til vega eina nýggja talgilda heilsuskipan, er byrjað. Nýggja talgilda heilsuskipanin skal vera ein felags sjúklingajournal fyri alt heilsuverkið, og fer at styrkja tvørgangandi samstarvið ímillum geirar, og fer at lætta um gerandisdagin hjá heilsustarvsfólki. Starvsfólk eru sett í starv, og arbeiða við fyrsta stiginum, sum fevnir um at gera kravfesting og finna útav, hvør komandi talgilda heilsuskipanin skal vera.

Eitt av teimum stóru og meira sjónligu strategisku málunum er, at Sjúkrahúsverkið í juli kundi almannakunngera okkara nýggju felags heimasíðu, sum starvsfólk frá øllum trimum sjúkrahúsunum hava arbeitt við í langa tíð. Á heimasíðuni kunnu sjúklingar og avvarðandi nú finna alla kunning um sjúkrahúsini, viðgerðir og kanningar á einum stað.

Á heysti 2024 varð ein nýggj trivnaðarkanning gjørd í Sjúkrahúsverkinum. Endamálið við kanningini er at fáa yvirlit yvir, hvat rørir seg í Sjúkrahúsverkinum, og hvat hædd skal vera tikið fyri í mun til trivnað, so at vit kunnu varðveita og styrkja Sjúkrahúsverkið sum eitt attraktivt og effektivt arbeiðspláss.

Hetta er tann triðja trivnaðarkanningin í Sjúkrahúsverkinum, og úrslitini lógu á áleið sama støði sum, tá seinasta trivnaðarkanningin varð gjørd, og gevur okkum grundarlag fyri at fremja betranarátøk á teimum trimum sjúkrahúsunum. Tað sæst eisini aftur, at tey átøk, sum eru sett í verk higartil, hava gjørt mun fyri trivnaðin á fleiri deildum. Les meira um strategiarbeiði á síðu 13.








# Byggiarbeiði og flytingar

## Seinna hálvár í 2024 helt innflytingin í H-bygningin á Landssjúkrahúsinum fram.

Í august flutti Ergo- og fysioterapideildin úr A-bygninginum, ið er elsti bygningurin á Landssjúkrahúsinum, yvir í nýggja H-bygningin. Nýggi bygningurin er ein stór broyting fyri teir borgarar, sum koma inn til venjing hjá Ergo- og fysioterapiini. Tað eru sera góðar umstøður í venjingarhølunum, og tey, sum brúka hølið, eru ómetaliga glað fyri nýggju umstøðurnar. Deildin hevur nógv meiri útgerð, og tað riggar væl at hava bólkavirksemi, nú hølini eru størri.

Í oktober flutti medisinska seingjardeildin, sum fyrr var staðsett á B6, á H1 í H-bygninginum. Á nýggju seingjadeildini eru einastovur, ið er eitt frambrot fyri bæði sjúklingar, teirra avvarðandi og starvsfólk.

Í november flutti Børn og Ung somatik, tað sum fyrr var kallað barnadeildin og neonatal, sum er stovurnar til ov tíðliga fødd børn. Flytingin innbar eisini eina samanlegging av hesum báðum deildum, sum nú eru ein samlað deild til børn og ung við likamligum sjúkum.

Ætlanin er, at restin av H-bygninginum verður tikin í nýtslu í 2025.

Eisini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hevur byggiarbeiðið fylt nógv í farna árinum. Arbeitt hevur verið við at umvæla Gomlu læknahúsini. Húsini, sum vórðu bygd í 1923, eru høvuðsumvæld, men hava framhaldandi gamla bygningssniðið, og gamla tilfarið er í størstan mun endurnýtt. Fyrisitingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er flutt inn í Gomlu læknahúsini.

Stór umbygging hevur eisini verið til nýggja MR-virksemið, sum hevur ávirkað gerandisdagin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi á ymiskan hátt, eitt nú gjørdi umbyggingin stórt inntriv í umklæðingarrúmini, sum nú verða dagførd, so tey gerast góð og tíðarhóskandi.












# Slóðbrótandi tól til Sjúkrahúsverkið

Í 2024 varð Sjúkrahúsverkið styrkt við tveimum slóðbrotandi tólum til at nágreina sjúkur.

### MR-skannari á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Tann 30. apríl kom 3 Tesla MR-skannari til Klaksvíkar Sjúkrahús. Hesin skannarin er tann besti, sum Siemens hevur at bjóða.

Hetta fer at lata upp fyri møguleikum, ið vit áður ikki hava kunnað bjóðað í Føroyum.

At gera MR-kabinu krevur nógv byggiarbeiði og tekniskar installatiónir. Tá rúm til MR-skannara skal gerast klárt, eru nógv atlit at taka viðvíkjandi MR-trygd. Tilgongdin og tíðarætlanin fyri fyrireikandi arbeiðið, umbygging og allar teknisku installeringarnar gingu væl.

Tann 21. mai varð skannarin tikin í nýtslu og arbeitt verður framhaldandi við at førleikamenna starvsfólk, til enn betur at kunna gagnnýta tólið.

### CT-skannari á Landssjúkrahúsinum

Tann 9. apríl 2024 kom nýggjur CT-skannari á Landssjúkrahúsið. Skannarin, sum bleiv avloystur var tá vorðin 12 ár, sum er nógv í tólaverðini. Til eitt slíkt tungt og tekniskt tól, kravdust stórar fyrireikingar. Gamla journalarkivið á Landssjúkrahúsinum varð tømt og síðan umvælt, til at kunna húsa skannaranum.

Nýggi CT-skannarin er ein high-end dual-energy skannari, og hevur givið víðkaðar møguleikar innan diagnostik. Tann nýggi skannarin er av kraftigasta slagi og gevur eina betri heildarmynd, tí hann arbeiðir skjótari enn gamli CT-skannarin. Eitt nú er hann góður at skanna hjørtu, sum flyta seg allatíðina, og tí kunnu vera ring at fáa støðuga mynd av. Hetta er eitt frambrot fyri Sjúkrahúsverkið og fer at geva øllum, ið hava tørv á skanning, eitt enn betri tilboð og meira nágreiniliga skanning.

# Strategi fram til 2025

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum hevur ment eina strategi fyri Sjúkrahúsverkið fram til 2025. Arbeiðsgongdin hevur verið støðug og góð, og væntandi eru øll málini rokkin ella sett í verk við ársenda 2025. 2024 var eitt ár, har fleiri mál vórðu bæði rokkin og sett í verk.

Ásett vóru 43 strategimál, sum hava til endamál at sameina og samskipa Sjúkrahúsverkið. Fýra av hesum eru løgd saman undir einum strategimáli, ið tilsamans gevur Sjúkrahúsverkinum 39 mál at arbeiða fram ímóti.



## Tilsamans eru 21 av 39 málum avrikað ella sett í verk. Fýra týðandi strategimál vórðu sett í verk í 2024.

Tey strategisku málini, sum vórðu verksett í 2024 eru:

### 3. Felags heimasíða

Nýggja felags heimasíðan hjá Sjúkrahúsverkinum varð almannakunngjørd í juli 2024. Heimasíðan er pallurin fyri samskifti og upplýsing til allar borgarar, uttan mun til hvar tey eru stødd landafrøðiliga. Við nýggju felags heimasíðuni betra vit og lætta um sambandið millum sjúkrahús og borgaran, sum skal leita sær kunning um ymisk viðurskifti innan Sjúkrahúsverkið.

### 15. Uppraðfesta ADHD-viðgerðartilboð

Sjúkrahúsverkið skal eftir førimuni menna tilboð í mun til tann tørv, sum er í samfelagnum. Útgreinan og viðgerð til vaksin við ADHD er eitt dømi um lutfalsliga nýtt tilboð, og bíðilistarnir eru drúgvir. Í 2024 varð ADHD-økið uppraðfest við øktari fíggjarligari játtan, og fleiri útgreiningar verða nú gjørdar enn áður.

### 23. Mannagongdir, tá starvsfólk byrja í og fara úr starvi

Felags mannagongd, tá starvsfólk byrja í og fara úr starvi, varð verksett í oktober 2024. Hetta tryggjar, at alt Sjúkrahúsverkið hevur tryggar og eins mannagongdir og tryggjar eins góða viðgerð og framferð fyri øll starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum, óansæð hvar arbeiðsstaðurin er.

### 39. Strategisk dimensioneringsætlan

Tilmæli um strategiska dimensioneringsætlan varð handað Heilsumálaráðnum í juni 2024. Strategiska dimensioneringsætlanin ásetur stødd og býti av ymisku sergreinunum í Sjúkrahúsverkinum, og hvussu tær skulu mannast við serlæknum. Strategiska dimensioneringsætlanin verður staðfest bæði fakliga og politiskt.

Smærri broytingar eru eisini gjørdar í strategiini hjá Sjúkrahúsverkinum. Mál 30, Nýggj talgild heilsuskipan, er víðkað, so at málið eisini fevnir um fylgjandi mál: Mál 25 Fleiri talgildar tænastur saman við Talgildu Føroyum, Mál 31 Pre-hospital journalskipan, Mál 32 Tryggja sjúklingadátur til uttanhýsis viðgerðarstovnar og Mál 33 Sjúklingaapp.

# Virksemið í Sjúkrahúsverkinum í tølum

Tølini í talvuni niðanfyri vísa eitt úrval av teimum viðgerðum, sum hava verið í Sjúkrahúsverkinum í 2024.

**12.300**
Innleggingar

**113.000**
Ambulantar vitjanir

**3.034**
Sjúklingaferðir uttanlands

**29.300**
Gistingar á Sjúklingahotellinum Tórshavn

**4.640**
Skurðviðgerðir

**660**
Dagskurð

**580**
Børn fødd

**7.700**
Sjúkraflutningar

**11.000**
Skaðastovu-vitjanir

**1.640.509**
Rannsóknarstovu-kanningar

**47.961**
Røntgenkanningar

**4.347**
MR-skanningar

**12.467**
CT-skanningar

**1.986**
Blóðgávur latnar blóðbankanum

**1.137**
Starvsfólk ársverk

**3,9**
Miðal innleggingartíð (dagar)

Talið av ambulantum vitjanum er broytt munandi síðan síðsta ár, orsøkin er broyting av mannagongdunum fyri, hvørjir aktivitetir verða taldir við sum ambulant virksemi. Arbeitt verður áhaldandi við at betra skráseting og mannagongdir, so væntast kann, at hetta talið aftur broytist til komandi ár.

# Fíggjarliga úrslitið: 11,2 mió. kr. í avlopi

Játtanin hjá Sjúkrahúsverkinum í 2024 var 1,15 mia. kr., og samanlagt var úrslitið eitt avlop á 11,2 mió. kr. Serliga var tað kontan til viðgerð uttanlands, sum hevði stórt avlop, hóast metnógvir sjúklingar vórðu sendir uttanlands til viðgerð.

| í 1000 kr. | Játtan 2024 | Roknskapur 2024 | Avlop/Hall 2024 |
|---|---|---|---|
| Úrslit Klaksvíkar Sjúkrahús | 104.796 | 104.572 | 224 |
| *Klaksvíkar Sjúkrahús* | *104.796* | *104.572* | *224* |
| Úrslit Suðuroyar Sjúkrahús | 90.088 | 90.089 | -1 |
| *Suðuroyar Sjúkrahús* | *90.088* | *90.089* | *-1* |
| Úrslit Landssjúkrahúsið | 742.477 | 743.026 | -549 |
| *Landssjúkrahúsið* | *739.777* | *740.940* | *-1.163* |
| *H-bygningurin, kliniskt virksemi* | *3.000* | *2.455* | *545* |
| *Landssjúkrahúsið, inntøkufíggjað virksemi, vaskarí* | *- 300* | *- 369* | *69* |
| Úrslit Serviðgerð uttanlands | 177.135 | 166.149 | 10.986 |
| *Serviðgerð uttanlands* | *151.023* | *140.995* | *10.028* |
| *Serviðgerð utttanlands, flutningur* | *26.112* | *25.154* | *958* |
| Úrslit Sjúklingahotellið Tórshavn | 26.604 | 26.307 | 297 |
| Serviðgerð uttanlands, Sjúklingahotellið Tórshavn | 26.604 | 26.307 | 297 |
| Úrslit KT-øki heilsuverksins | 10.343 | 10.024 | 319 |
| *KT-øki heilsuverksins* | *10.343* | *10.024* | *319* |
| **Úrslit fyri Sjúkrahúsverkið** | **1.151.443** | **1.140.167** | **11.276** |

# Politiskar raðfestingar í 2024

Virkisøkir, ið hava fingið ítøkiliga játtan.

**1.950 tús. kr. vórðu játtaðar til bráðfeingis hjálp til sálarligar trupulleikar (í alt 3,9 mió)**
Ein skipan varð sett í verk miðan apríl, har eyka kvøldvakt er staðsett á P40, sum hevur telefonvakt, um tørvur verður á bráðfeingis hjálp til fólk við sálarligum trupulleikum, sum ringja til læknavaktina á 1870. Skipanin er fyribils eftirmett og er løgd fram fyri Heilsumálaráðnum.

**1.322 tús. kr. vórðu játtaðar til dialysusatelitt á Suðuroyar sjúkrahúsi og dialysukoyring (í alt 2.472 tús.kr.)**
Sjúkrarøktarfrøðingar eru settir í starv, og dialysa á Suðuroyar sjúkrahúsi varð sett í verk 4. mars 2024. Sjúkraflutningstænastan skipar fyri flutningi av dialysusjúklingum í Suðuroy.

**200 tús. kr. vórðu játtaðar til fyrireiking av eygnalæknaviðtalum og forkanningum í Suðuroy**
Arbeiðsbólkur varð settur og hevur gjørt tilmæli til Heilsumálaráðið um eygnalæknaviðtalu í Suðuroy.

**4,25 mió. kr. vórðu játtaðar til átøk at stytta bíðilistar í Sjúkrahúsverkinum**
Sjúkrahúsini hava í felag lagt virksemið til rættis, soleiðis at bíðilistarnir vórðu styttir mest møguligt við játtanini, sum var veitt til endamálið. Bíðilistarnir vórðu styttir við 1.372 persónum í alt.

**3 mió. kr. vórðu játtaðar til at seta serlæknar í starv**
Í 2024 vórðu 2 serlæknar settir í starv eftir serlæknajáttanini: ein serlækni í dermatologi og ein serlækni í pínuviðgerð.

**1,5 mió. kr. vórðu játtaðar til íverksetan av krabbameinsátøkum**
Læknaskrivari og sjúkrarøktarfrøðingur eru sett í starv í Endoskopiini. Læknaskrivari er settur í starv í Screeningseindini. Harumframt eru turkiskáp við tilhoyri keypt til Endoskopiina. Ein arbeiðsbólkur varð skipaður, sum hevur gjørt tilmæli til Heilsumálaráðið um tarmkrabbascreening.



# Gomlu læknahúsini í Klaksvík

Fyrisitingin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi er flutt í Gamla læknahúsið, og stóran part av árinum 2024 hevur arbeitt verið við at gera húsið klárt.

Húsini eru bygd í 1923, á sama stað sum fyrru læknahúsini, ið vóru bygd umleið 1870, stóðu. Hesi fyrru læknahúsini vórðu tikin niður, av tí tey vóru í so sera ringum standi. Nógv av viðinum er tó nýttur aftur í Gomlu læknahúsunum, sum í dag standa so hábærslig. Tað var Jógvan Zachariasen, læknin, sum fyrstur flutti inn í Gomlu læknahúsini. Jógvan Zachariasen var ættaður av Kirkju á Fugloy. Hann var fyrst útbúgvin lærari og síðani lækni.



Eitt afturlit vísir, at gomlu læknahúsini hava verið bæði bústaður og læknaviðtala hjá nógvum ymsum læknum, fram til 1995. Nógvar álvarsamar, fittar og spennandi søgur eru knýttar at húsunum. Bæði um fólkini, ið hava búð har og um økið rundanum. Sjúkrasystur, sum mintist til tíðina, tá ið ein lækni nevndur Dr. Stærmose starvaðist á sjúkrahúsinum, hevur fortalt, at hann illa sjúkur var noyddur at fara úr sjúkrasongini yvir á sjúkrahúsið at gera kejsaraskurð á eina barnakonu, soleiðis at hon og barnið kundu yvirliva. Bert fáar dagar seinni andaðist hann.

Húsini eru høvuðsumvæld, men hava framhaldandi verandi bygningssnið og gamla tilfarið er í størstan mun endurnýtt. Urtagarðurin við trøum, sum eru uppi í teimum elstu í Føroyum, er hampaður. Húsini eru vøkur bæði innan og uttan og hava uppiborið at koma til sín rætt aftur. Næsta stig verður at fríðka meira um urtagarðin, sum vónandi verður til gagns fyri sjúklingar, avvarðandi, starvsfólk og øll onnur, sum ynskja eina friðsæla løtu í einum vøkrum og veðurgóðum umhvørvi í Klaksvík.

# Nýggj dialysudeild á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Suðuroyar Sjúkrahús fór tann 4. mars í 2024 at bjóða dialysuviðgerð til sjúklingar í Suðuroy.

Kjakið fylti nógv í almenna orðaskiftinum, og samstundis løgdu starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum nógva orku í at arbeiða við at kanna, hvussu dialysviðgerð kundi gevast á tryggan og so skynsaman hátt sum gjørligt.

Sjúklingarnir hava bíðað, ímeðan fakfólkið dúgliga gjørdu sítt fyri at leggja karmarnar um viðgerðina. Málið varð ein longri tilgongd, har allir partar hava arbeitt ótroyttiliga við at finna eina loysn. At hetta kom á mál vísir styrkina og týdningin, sum liggur í sameinda Sjúkrahúsverkinum. Víst varð í verki, at Sjúkrahúsverkið er í øllum Føroyum.

Í dag fáa sjúklingarnir hæmodialysu á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og noyðast tí ikki túrin norður um fjørðin til Landssjúkrahúsið upp til fleiri ferðir um vikuna.







# Virksemi á øllum hæddum í H-bygninginum

Árið 2024 var merkt av enn fleiri innflytingum í H-bygningin. Nú arbeiða fólk á øllum hæddum, og enn fleiri sjúklingar húsast í einastovunum, sum bygningurin hevur at bjóða. Hóast snøklar hava verið á leiðini, hevur tað eydnast starvsfólkunum at flyta inn í spildurnýggj høli.

Ársins fyrsta flyting var í august, tá Ergo- og fysioterapiin flutti deildina inn. Medisinsk seingjardeild flutti í september, og køkurin bjóðaði øllum vælkomnum í nýggja matarstaðið Skálanum sama mánaða. Deildin fyri børn og ung við somatiskum sjúkum og deildin fyri ov tíðliga fødd børn flutti inn síðst í november.

Sostatt hava vit nú eina skurðseingjardeild á ovastu hædd, umframt børn og ung somatik og ov tíðliga fødd børn. Eina hædd longri niðri rúmast medisinsk seingjardeild, og hæddina undir deildin fyri ergo- og fysioterapi. Longri niðri, í hæddini ið verður kallað H-Sandagerð, rúmast køkurin og matarstaðið Skálin, og á H-Álaker, sum er niðasta hæddin, er seingjavask staðsett.

H-bygningurin hevur sostatt virksemi á øllum hæddum.

### Ergo- og fyrioterapiin funnið seg væl til rættis

Álvur Hansen, leiðari á Ergo- og fysioterapiini, fegnast um nýggju umstøðurnar deildin hevur, nú flutt varð úr A-bygninginum, ið er elsti bygningurin, yvir í nýggja H-bygningin.

Hóast summi starvsfólk vóru eitt sindur ivandi og stúrin um flytingina, og hvussu umstøður og arbeiðsgongdir fóru at verða, so hevur tað riggað avbera væl og fólk hava funnið seg til rættis.

Flytingin innibar eisini, at Ergoterapiin og Fysioterapiin fluttu saman. Kenslan er, at hetta hevur skapað nógv betri synergi millum økini. Álvur Hansen nevnir, at hóast økini hava ymiskar mentanir, so funnu hesar skjótt útav, hvussu tær kundi arbeiða tætt saman.

Leiðarin á Ergo- og fysioterapiini fegnast eisini um, at ljósviðurskiftini nú eru vorðin nógv betri. Tað natúrliga dagsljósið fyllir bygningin úr erva. Rúmini eru stór og rúmlig og serliga fegnast tey um, at tey, sum nú koma til endurvenjing í Ergo- og fysioterapiini hava fingið nógv betri umstøður.

“Vit hava ómetaliga góðar umstøður í venjingarhølunum. Tey, sum brúka hølið, eru ómetaliga glað fyri nýggju umstøðurnar. Vit hava nógv meiri útgerð og tað riggar væl at hava bólkavirksemi, nú hølini eru væl størri. Okkara starvsfólk hava nógv betri yvirlit og fáa betur fylgt við, tá fleiri fólk eru til venjingar samstundis”, sigur Álvur Hansen.

Svimjihylurin er enn staðsettur í A-bygninginum.

Í 2025 verður arbeitt fram ímóti, at restin av bygningi-num verður tikin í nýtslu.

# Stórt átak fyri at stytta bíðilistar í Sjúkrahúsverkinum

Á heysti í 2024 varð stórt átak gjørt fyri at stytta um bíðilistarnar í Sjúkrahúsverkinum.

Løgtingið játtaði 4,25 milliónir krónur til at stytta bíðilistar til viðgerðir í Sjúkrahúsverkinum. Sjúkrahúsini hava í felag lagt virksemið til rættis, soleiðis at bíðilistarnir verða styttir mest møguligt við játtanini, sum er veitt til endamálið í ár. Bíðilistarnir vórðu styttir við tilsamans 1.372 persónum fyri ársenda.

Játtanin er brúkt til at stytta bíðilistarnar á ymiskum økjum, har Sjúkrahúsverkið hevur mett, at tørvurin er størstur, og har tað hevur verið møguligt at økja virksemið.

Hóast tað er avbjóðandi at stýra bíðilistum, arbeiðir Sjúkrahúsverkið støðugt við at betra viðgerðartíðirnar.

Við hesari játtan fekk Sjúkrahúsverkið meira at gera, sum eisini gjørdi, at tað bleiv neyðugt at umskipa arbeiðið á ymsum deildum. Hetta hevur bert borið til, tí vit hava starvsfólk sum eru fleksibul og ikki eru bangin fyri at taka eitt eyka tak. Átakið hevur verið til stóra gleði hjá teimum sjúklingum, sum hava bíðað eftir viðgerð.

**Millum hesi eru:**

- 890.000 kr. til ADHD-útgreiningar á Landssjúkrahúsinum
- 382.000 kr. til ortoalloplastik (mjadnar og knø) á Klaksvíkar Sjúkrahúsi
- 98.000 kr. til pínuklinikkina á Suðuroyar Sjúkrahúsi
- 346.000 kr. til Barna- og ungdómspsykiatri á Landssjúkrahúsinum
- Umframt játtan til 19 onnur øki innan Sjúkrahúsverkið (eitt nú magatarmskurð, urologi og æðraknútar)





# Landssjúkrahúsið 100 ár

## Tann 23. februar í 2024 vóru 100 ár liðin, síðan Dronning Alexandrines Hospital varð tikið í nýtslu.

Í dag er tann parturin av Landssjúkrahúsinum vanliga kendur sum føðideildin, og flestu føroyingar hava helst livað sínar fyrstu tímar av lívinum í eyðkenda bygninginum.

Áðrenn árið 1924 var sjúkrahúsið í Tórshavn nevnt Færø Amts Hospital, nú nevnt Gamla Hospital, staðsett í Lágabø, beint við Müllers Pakkhús og skipasmiðjuna. Undir hátíðarhaldinum tann 23. februar 1924, har Alexandrine drotning var til staðar, bað løgtingsmaðurin Johan Hendrik Poulsen, vegna Føroya Løgting, drotningina um loyvi at nevna hospitalið Dronning Alexandrines Hospital. Soleiðis kom tað at eita, til tað í 1962 fekk navnið Landssjúkrahúsið.

Tá flutt varð inn í 1924 starvaðust 28 fólk á hospitalinum. Landssjúkrahúsið hevur verið í rúkandi menning síðan spakin varð settur í jørðina omanfyri Sandagerð í 1923.

Í dag starvast um 1000 fólk á Landssjúkrahúsinum, og arealið er vorðið áleið 62.000 m$^2$. Tað sigur nakað um, hvussu nógv er broytt hesi seinastu 100 árini, tí nú rúmast enn meira fakliga dygd, og harvið fáa enn fleiri fólk hjálp frá okkara dugnaligu starvsfólkum.

100 ára veitslan varð hildin tann 5. mai í Ítróttarhøllini á Hálsi. Til veitsluna vóru starvsfólk úr øllum Sjúkrahúsverkinum boðin. Eisini vóru løgmaður, landsstýrisfólk, Heilsumálaráðið, umframt fyrrverandi sjúkrahússtjórar og aðrir samstarvsfelagar boðin. Til veitsluna komu 720 gestir, og tað var ein rimmar veitsla. Myndirnar lýsa góða lagið til veitsluna.






Væl
komin
19
24
Landssjúkrahúsið







# **VISJÓN** 2025
# MISSIÓN
# OKKARA VIRÐIR




# VISJÓN

### Eitt sameint sjúkrahúsverk á altjóða stigi, eyðkent fyri nýhugsan

- Trý sjúkrahús, sum samskifta, virka og skapa eftir somu virðum.
- Felags mentan og sami samleiki tvørtur um sjúkrahúsini.
- Virðing fyri sjúklingum, avvarðandi og starvsfólki, so at góð hugskot birtast og hava gróðrarlíkindi fyri víðarimenning.
- Áhaldandi menning av starvsfólkum, stuðlað av nýggjastu tøkni.
- Rættstundis sjúkugreinan og viðgerð við skipaðum sjúklingagongdum.

# MISSIÓN

### Dygdargóð heilsutænasta alt lívið

- Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.
- Málið er dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni.

### Vitan

- Faklig vitan, førleikar og menning.
- Tøkni í breiðastu merking.
- Mentan, sum er opin og fevnandi.

### Tænastusinni

- Uppliving av at vera í miðdeplinum.
- Uppliving av góðari tænastu.
- Uppliving av nærlagni.

# VIRÐIR

## Stev

At hava felags stev gevur styrki, sýnir samanhald og vekir álit.

Fyri at halda felags stev, mugu vit arbeiða tvørtur um mørk, deildir og fakøki. Vit eru øll javnlík, tá uppgávur skulu loysast – og fyri at koma á mál krevur tað bæði samskipan, samskift i og eina neyva kós.

Rúm skal vera fyri øllum, og vit skulu duga at gagnnýta styrkirnar hjá tí einstaka. Øll skulu kenna seg vird, og øll skulu kunna siga sína hugsan.

### Í atburði merkir hetta:

- at tú í talu og verki sýnir sjúklingum og starvsfeløgum virðing.
- at tú setur teg inn í støðuna hjá tí, tú samstarvar við.
- at tú raðfestir felags mál hægri enn egin mál.
- at tú vísir toymisanda millum deildir, deplar og sjúkrahús.

## Áræði

At hava áræði gevur drívmegi og skapar framburð.

Fyri okkum er umráðandi at vera ágrýtin, sýna jaligan hugburð og vilja royna nýggjar leiðir. Vit skulu veita høga dygd og skjótleika.

### Í atburði merkir hetta:

- at tú birtir vón og vísir á gongdar leiðir.
- at tú ert áhaldandi og vísir nærlagni.
- at tú eggjar til loysnir.
- at tú tekur ábyrgd, tá avgerðir skulu takast.

## Flog

At hava flog merkir, at vit kunnu vera skapandi, hugsa víðskygt og navigera í broytingum, samstundis sum vit loysa okkara uppgávur.

Flog er eitt fjøltáttað hugtak, sum krevur, at vit brúka okkara hugfl og, eru forvitin, koma við góðum hugskotum, mennast og skapa yvirlit.

Fyri at halda flognum krevst framfýsni. Til tess krevst føði – vitan og menning.

### Í atburði merkir hetta:

- at tú setur høg mál og torir at bróta upp úr nýggjum.
- at tú býður vanahugsan av.
- at tú ert móttøkubúgvin fyri broytingum.
- at tú støðugt víðkar sjónarringin.

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ